# BILAR

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO

P/F Wenzel:

## Sponsoravtalu við B71

Bilasølan P/F Wenzel hevur gjørt sponsoravtalu við B71, sum m.a. inniber at venjari teirra, Dusan Mokan, fær ein Ford Focus 1,6 h/b at koyra í. Eisini skal Ford standa á búnum, á heimasíðuni og á lýsingum við vøllin.




*Oddmar Ørvarodd, stjóri hjá P/F Wenzel (h.m.), handar Magnusi H. Olsen, nevndarlimi og leikara hjá B71, Ford Focus bilin. Á myndini er eisini ein av amerikonsku Ford Explorer V8 4x4, sum fyritøkan umboðar*

*åMynd: Jens Kristian Vang*

Norskur koyrilærari:

## Breiðu brillustellini eru hættislig

**Nýggju mótabrillurnar við breiðum stongum gera tað at bilførarar við slíkum brillum ikki síggja nóg væl til síðurnar, sigur ein norskur koyrilærari sum ger vart við, at hetta kann koma at kosta mannalív**

FERÐSLUTRYGD
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Breiðar brillustengur forða bilførarum í at hyggja seg nóg væl fyri, sigur norski koyrilærarin Aadne Fossnes við norska blaðið „Agderposten". Hann er bangin fyri at hetta í ringasta føri kann koma at kosta mannalív.

Stengurnar á nýggju mótabrillunum eru alt ov breiðar. At nakar kann nýta tær sum koyribrillur er fyri mær heilt ófatuligt, sigur Aadne Fossnes við blaðið.

Hann skýtur upp, at ikki verður loyvt at koyra bil við "breiðu" brillunum. Eg nokti mínum næmingum at nýta hesar brillurnar, sigur hann.

Sven Gustav Paulsen, ráðgevi hjá "Norges Optikerforbund", viðgongur, at nýggju brillurnar kunnu vera ein trupulleiki, og at teir ráða fólki, sum koyra í ferðsluni, til ikki at nýta brillur við ov breiðum stongum.

Vit kunnu leggja afturat at tey, sum koyra við hesum brillunum, mugu vera til reiðar at flyta høvdið undir koyring, so sleppast kann undan vandamiklum blindvinklum.

*Kelda: Ferðslutrygd*

